## Borgarstjórar mótmæla

Borgarstjórarnir í Eysturoynni vilja ikki góðtaka kunngerðina um røktarheim, sum almanna- og heilsumálaráðið hevur sent kommununum til hoyringar. Í svarskrivi siga teir níggju borgarstjórarnir, at kunngerðin er ágangur ímóti kommununum og virkseminum hjá sjálvsognarstovnunum, og teir vilja ikki góðtaka, at Eysturoyar Røktar- og Ellisheim, ið sambært skrivinum virkar sera væl, skal leggjast undir Nærverkið.

## Stanley á rundferð

Guitarsnillingurin og sangarin Stanley Samuelsen býr í Danmark, men í hesum døgum er hann á konsertferð í Føroyum. Í annaðkvøld er hann í Kagganum í sambandi við AME, fríggjakvøldið kl. 20 í Haldarsvík, leygarkvøldið kl. 22 í Vági, sunnudagin kl. 15 í Skálavík, mánakvøldið kl. 20 í Losjuni Gøtu, har Stanley eisini spældi á kyndilsmessu í 1966, og tann seinasta konsertin á hesum sinni verður á Eiði týskvøldið 17. apríl kl. 20.

Reiðaravirki í skjølum og tølum:

# Kubatrolararnir fara at l

**Í morgin klokkan 15 verður áhugaverd samkoma í hølunum hjá P/F Beta í Saltangará. Samkoman, sum er almenn fyri øllum áhugaðum, verður skipað sum framløga av øllum skjølum hjá reiðaravirkinum P/F Beta – heilt síðan felagið varð stovnað í 1977**

SKJØL OG TØL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Olaf Olsen, sum at kalla øll árini var reiðari í felagnum, hevur saman við Tjaldur, ið er gamla Skipafelag Føroya, stovnað ein sjálvsognargrunn við navninum, Beta Files. Hesin grunnur eigur nú øll arkivini og soleiðis eisini øll skjølini hjá reiðaravirkinum gjøgnum øll hesi mongu ár.

### Umbygdir til fiskiveiði

Mong av teimum, sum eru hampiliga tilkomin, munnu antin minnast allar hesar trolararnar, tá teir lógu við Havnarmola – ella myndina av teimum, sum upp ígjøgnum árini fleiri ferðir hevur verið á prenti í føroyskum bløðum.

Skipini vórðu keypt av Kuba, og tí vórðu bátarnir heilt til endans róptir undir felagsnavninum, kubatrolararnir, ið allir høvdu fuglanøvn.

Hóast felagið, sum fór undir at reka skipini á fiskiveiði, ikki varð stovnað fyrr enn í 1977, komu hesi skip til landið longu um ólavsøkutíð í 1973.

- Øll skipini komu í senn, og tey vóru 9 í tali, sigur Olaf.

Hann sigur, at teir, sum slóðaðu fyri hesi verkætlan, í fyrsta lagi vóru Oddur Niclasen, stjóri og Knútur Nolsøe, sum tá var tekniskur stjóri hjá Skipafelag Føroya.

í oljuvinnuni og fóru í vinnu stutt eftir, at tey vóru komin til landið. Men tað vísti seg, at tey fingu ov lítið at gera, sum tíðirnar vóru tá.

Olaf vísir á, at meðan fleiri feløg, sum hava rikið fiskiveiði, partvís ella heilt hava lagt um til tænastuvirksemi í oljuvunnini, avgjørdi Skipafelag Føroya tá at byggja kubatrolararnar um til fiskiveiði.

- Vit hava fleiri dømir úr eitt nú Noregi og Skotlandi um, at fiskiskip eru umbygd til tænastuvirksemi í oljuvinnuni, og vit hava eisini fleiri dømir um, at feløg partvís hava salað um og síðan hava verið virkin bæði í fiskivinnuni og oljuvinnuni.

Hann vísir soleiðis á, at føroyska felagið Thor í Hósvík í fyrstani rak fiskiskip og seinni av álvara fór upp í oljuvinnuna.

- Nú í vetur hava vit so aftur sæð, at felagið hevur keypt stórar trolarar og nú er rættiliga virkið bæði innan fiski-og oljuvinnu.




### Standby-skip

- Skipini komu upprunaliga til Føroya sum standby-skip

### Alt til skjals

Olaf Olsen sigur, at øll skjølini síðan stovningardagin eru til skjals, og talan er um meira enn eina miljón skjøl tilsamans.

Áður hevur verið nevnt, at rúgvusmikla skjalatilfarið, sum lýsir øll viðurskifti hjá reiðavirkinum hesi tríari árini, avgjørt hevði verið vert eina neyvari gransking og greining.

- Vit hava nú gjørt ein bókling yvir alt tilfarið – bæði á føroyskum og enskum, og hetta yvirlit, ið telir sjeyti síður, verður eisini lagt fram á samkomuni hósdagin, har øll áhugaði eru meira enn vælkomin, sigur Olaf Olsen, sum hesi ár hevur verið ímyndin av P/F Beta.

Á samkomuni í hølunum í Saltangará verður eisini okkurt til matna.

### Umbygd í Noregi

Í 1977 avgjørdi Skipafelag Føroya at stovna felagið Beta og umbyggja kubatrolararnar til fiskiveiði.

Olaf Olsen varð spurdur, um hann vildi átaka sær at skipa fyri rakstrinum av skipunum, og tað hevur hann gjørt at kalla øll hesi ár við undantaki av tveimum umførum í Tinganesi sum landsstýrismaður.

- Skipini vórðu umbygd í Noregi, og umbyggingin tók einar 10 mánaðir. Fyrstu skipini komu aftur úr Noregi til jólar 1977, og í 1978 vóru átta av skipunum til fiskiskap.

Hann sigur, at teir átta trolararnir vóru í vinnu øll hesi árini.

- Tey seinastu skipini av teimum gomlu vórðu seld til Noregs í november 2005, og frammanundan vórðu trý seld til hvør sín heimslut, Argentina, Gambia og Murmansk. Tey fyrru vórðu seld og skuldu halda fram at fiska, meðan skipini, sum seinast vórðu seld til Noregs, endaðu har, so norðmenn kundu skifta onnur skip út fyri hesi.

Hann sigur, at norðmonnum vantaðu skip um hetta mundið, og tí keyptu teir hesi gomlu skipini fyri at taka tey úr flotanum aftur fyri nýggjari skip.



*Tíðir broytast og umstøður við. Myndin er tikin, tá nýggju og flaggskrýddu skipini hjá Beta, Bakur og Stelkur, koma á Runavík. Við bryggjuna liggja fleiri av gomlu kubatrolarunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*